

KUNNING

*Poul Michelsen hevur gjørt avtalu við samgonguna sum inniber, at aftur fyri at stuðla Hans Paula Strøm sum formann í Uttanlandsnevndini, fær Poul atgongd til nevndir og kunning*

# Poul segði nei takk til formanspost

**POLITIKKUR Sjálvt um tað stóð honum í boði, tók Poul Michelsen ikki av at gerast formaður í Uttanlandsnevndini, nú John Johannesen gjørdist landsstýrismaður.**

Leo Poulsen

Eftir at Poul Michelsen gjørdist leysgangari í Løgtinginum, hevur samgongan mist meirilutan í Uttanlandsnevndini. Og tað kundi blivið ein trupulleiki í sambandi við, at formaðurin, John Johannesen, tó við sum landsstýrismaður í heilsumálum.

Andstøðan bjóðaði Poul Michelsen formanspostin í Uttanlandsnevndini, men fyrrverandi fólkafloksmaðurin valdi ikki at taka av.

– Tað er soleiðis, at sum leysgangari í Løgtinginum fær tú ikki somu kunning, sum tá tú er í einum flokki. Og tað hevur verið ein stórur trupulleiki. Tí havi eg heldur gjørt eina avtalu við samgonguna aftur fyri at stuðla valinbum av Hans Paula Strøm sum nýggjan formann í Uttanlandsnevndini, sigur Poul Michelsen.

Henda avtalan inniber, at Poul Michelsen fær sæti í øllum nevndum, har floksformenninir sita, og tað merkir eisini, at hann hereftir fær alla neyðuga kunning í samband við mál, sum hinir tinglimirnir fáa.

– Hetta hevur størri týdning fyri meg, enn at sita á einum formansposti í Uttanlandsnevndini, sigur Poul Michelsen.

Leysgangarin er annars á trappuni at boða frá, hvussu framtíðin skal skipast. Tað hevur leingi ligið á ljóði, at nýggjur flokkur er á veg, men enn heldur tingmaðurin kortini tætt at kroppinum.

Fyribils er støðan tann, at Poul Michelsen er komin nærri kunningini, sum hann hevur saknað, síðani hann tók seg úr Fólkaflokkinum.

# Schwartz skal stjórna Eik

**STJÓRASTARV Tað kemur ikki heilt óvart á, at tað í morgun varð kunngjørt, at Súni Schwartz Jacobsen setur seg í stjórasessin í Eik Banka. Hann legði samstundis frá sær sum stjóri í BankNordik**

Leo Poulsen

Tað hevur í eina tíð ligið í kortunum, at tað bleiv Súni Schwartz Jacobsen, sum frameftir skal stýra Eik Banka Føroyar.

Súni Schwartz Jacobsen hevur í fleiri ár verið stjóri í BankNordik saman við forstjóranum, Janus Petersen, men hann heldur, at lagaliga løtan er nú at finna nýggjar avbjóðingar.

Súni Schwartz sigur, at føroyski parturin av Eik Banka í botn og grund er sunnur, og at tað er danski parturin, sum koppaði bankanum.

- Eg síggi hetta sum eitt ógvuliga spennani starv. Talan er í veruleikanum um eina 200 ára søgu, sum ikki viskast burtur uttan víðari, sigur Súni Schwartz Jacobsen.

Talan hevur ikki verið um eina drúgva tilgongd.



AVBJÓÐING

*Súni Schwartz Jacobsen heldur nýggja starvið sum forstjóri í Eik Banka er ein spennandi avbjóðing*

- Nei, tað eru nakrir dagar síðani eg fekk fyrispurning frá Eik Banka, og eg ivaðist ikki í at taka av. Sum nevnt haldi eg at føroyski partuin av Eik Banka grundleggjandi er sunnur, og har eru dugnalig starvsfólk, so talan er um eina spennandi avbjóðing, sigur Súni Schwartz Jacobsen.

Hann byrjar tó ikki í stjórastarvinum fyrr enn 25. mai, og tað kemst av, at hann sjálvandi hevur ein sáttmála við BankNordik, sum skuldi upployst.

Tað hevur tikið nakrar dagar at greiða viðurskiftini við nevndina í BankNordik.

- Tað hevur sjálvandi eisini talt við, at talan er um eitt forstjórastarv, og eg harvið havi avgerandi ávirkan á raksturin av bankannum, sigur Súni Schwartz Jacobsen.

Hann kann tó einki siga um hvørki strategi ella annað, tí hóast hann hevur eitt yvirorðnað innlit í Eik Banka, kennir hann ikki smálutirnar. Hann kann tí hvørki vátta ella avsanna, um talan kann gerast um fleiri tillagingar og harvið uppsøgnir av fleiri starvsfólkum.

Súni Schwartz Jacobsen tekur sum nevnt við sum forstjóri í Eik Banka 25. mai. Jørn Astrup Hansen heldur fram sum stjóri fram til síðst í mars, tá ein nevndarlimur røkir stjórastarvið, til nýggi stjórin tekur við.

# Fullgóður avloysari

**STJÓRI John Rajani verður avloysarin hjá Súna Schwartz Jacobsen, nú hesin fer í starv sum forstjóri hjá Eik Banka Føroyar**

Leo Poulsen

Á tíðindafundi í morgun boðaði BankNordik frá, at tað verður John Rajani, sum skal loysa Súna Schwartz Jacobsen av sum stjóra.

Nevndarformaðurin, Claus Rasmussen, segði, at tað kom ikki óvart á hjá leiðsluni, Súni Schwartz Jacobsen endaði hjá kappingarneytanum.

- Eik Banki hevði brúk fyri ein nýggjum stjóra, og hvar var meiri náttúrligt at finna hann enn her í BankNordik, segði Claus Rasmussen.

Hann segði, at Bank Nordik hevur gjørt avtalu við Eik Banka, sum eitt nú innber, at Súni Schwartz ikki tekur við fyrr enn 25. mai.

- Stjóraskiftið gevur eisini BankNordik nýggjar møguleikar. Vit hava verið gjøgnum figgjarkreppu og bankapakkar, og tí hevur fokus ikki í eins stóran mun verið á kundan. Og júst á tí økinum hevur John Rajani eina av sínum styrkjum, segði Claus Rasmussen.

John Rajani segði, at hann gleddi seg til hesa stóru avbjóðingina.

- Eg eri takksamur fyri, at leiðslan hevur víst mær hetta álitið. Vit hava ein sterkan banka við góðum starvsfólkum, og eg fari at gera mítt til, at kundaøkið fer at mennast, segði nýggi stjórin, John Rajani.



MIST BRODDIN

*Tíðindafundrin í høvuðsdeildini hjá BankNordik var ikki so spennandi, tí tíðindini vóru longu komin út*

Mynd: Álvur Haraldsen

Eisini forstjórin, Janus Petersen, sær ljóst upp á framtíðina.

- Tíðirnar broytast, og vit hava fingið ein fullgóðan avloysara fri Súna Schwartz Jacobsen, so eg vænti, at vit koma væl burtur úr skiftinum, segði Janus Petersen.